**8. fl í Hoyvíkar skúla**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 8/2010: Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í revsilógini (seta revsialdurin niður)**

**Uppskot**

**til**

**ríkislógartilmæli um broyting í revsilógini (seta revisaldurin niður)**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar soljóðandi kongliga fyriskipan:

**§ 1**

§ 15 í lógarkunngerð nr. 215 frá 24. juni 1939, revsilógin, sum seinast broytt við fyriskipan/anordning nr. 182 frá 28. februar 2007 verða orðini "*handlinger foretagne af børn under 15 år straffes ikke*" strikað, og verða ístaðin orðini "*Børn under 14 år straffes ikke.*" sett inn.

**§ 2**

Lógin kemur í gildi tann 1. juli 2010.

**Viðmerkingar**

Ynskiligt er, at tann kriminelli lágaldurin verður settur niður til 14 ár, tí tað eru fleiri undir 15 ár, sum gera brot á revsilógina. Fleiri ung ganga og keða seg í býnum, tí tey ikki hava so nógv at ganga uppí, eftirsum tað ikki eru so nógv tilboð til ung í vikuskiftunum. Mett verður, at tannáringar, ið føla seg nóg vaksnan til at fremja brot á revsilógini, eisini skulu standa til ábyrgd fyri sínum gerðum og vera búgvin til at skilja millum rætt og skeivt.

Í Danmark hevur verið nógv kjak um revsialdurin, hvørt hann skal setast niður ella ikki. Eisini hevur onkur politiskur flokkur í Danmark tosað um, at seta revsialdurin heilt niður til 12 ár.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Katrin Dahl Hanusson    Andreas Samuelsen    Laila Midjord

Sudarat Niyomtham    Niclas Vágsheyg Brixen    Hávarður Guttesen